**Ein heilsan úr Brazil**

Tryggingarsvik var ein góð inntøka. Fólk góvu fegin nógvar pengar fyri at fáa hjálp til at súgva pengar úr tryggingarfeløgunum. Nú hevði hann skjótt fingið nóg mikið av pengum til at byrja eitt nýtt luksuslív. Í hansara verð var luksus eitt lív baðað í pengum.

“Hevur tú tað gott? Ja, alt er fínt her. Havi í roynd og veru ikki havt tað betri.”
Jan stardi at postkortinum. Undir tekstinum var eitt smiley við einum stórum smíli. Kortið var sent til hansara við ongum avsendara. Hann vendi kortinum og hugdi gjølla at tí. Ein long hvít sandstrond, hálvnakin brún fólk hugnaðu sær á strondini; har vóru hvít háhús at síggja í baksýninum. Ovast í høgra horni var ein mynd av einari rættiliga stórari standmynd av Jesusi, við útstrektum ørmum, sum peikaðu upp í móti fjallinum. “Greetings from Brazil” las hann, áðrenn hann legði kortið frá sær á borðið. Hann stardi inn í tann nakna veggin framman fyri sær við tí lítla brenniglugganum.
Hann datt í ta smølu songina og lenaði seg afturav, uttan at fáa við, hvussu kaldur og ráur veggurin var. So fjaldi hann andlitið millum hendurnar og hugsaði aftur. Fyri seks árum síðani sá alt øðrvísi út....
“Skalt tú longu avstað?” Mai-Britt lá enn í songini; hon hevði lagað allar púturnar aftan fyri ryggin og hálað ta mjúku dýnuna heilt upp til høkuna. Hon hugdi við himmalvendum eygum at honun. Tað síða, ljósa hárið minti um eina gloriu um høvur hennara, hon var vøkur á at líta.
“Ja, tíverri.”
Jan stóð við fótalagið og læt seg í buksurnar, meðan hann suffaði. Hennara reyðu bibbur komu undan dýnuni; og tær mintu hann um frísk jarðber. Hann vildi so fegin verið eina løtu afturat.
“Eg havi eina avtalu. Eg kann ikki koma ov seint. Men vit síggjast í morgin elskaða,” hann gav henni ein muss og fór avstað.
Eina løtu seinni stóð hann á vegnum við súkkluni og hugdi upp í tað lýsandi vindeygað. Har var ljós. Hon las óivað eina krimi, sum hon hevði liggjandi á náttborðinum.
Klokkan var nógv. Hann mátti skunda sær. Har var eingin tíð at spilla, so hann trampaði á pedalarnar.
Skjótt kom hann á møtistaðið. Har var sera skýmligt, har var bara ein bilur, tíbetur. Jan súkklaði yvir til henda flotta silvurlitta “LAMBERGHINI” murcielago við 600 hk stóran motor. Tá ið hann kom heilt tætt, sá hann ein skugga flyta seg.
Hann bankaði uppá rútin, maðurin steig úr bilinum.

“Nielsen?” Spurdi Jan. Maðurin nikkaði. “Ert tú Símun?” Segði Nielsen við djúpari rødd.

Jan nikkaði, tá ið hann hoyrdi loyninavn sítt. “Er alt í ordan?”

Alt er í ordan, svaraði Nielsen og rætti honum billyklarnar. Síðani tók hann ein brævbjálva úr lummanum og rætti honum hann,  “og tú orðnar restina, sum avtalað.”

Jan nikkaði og tók brævbjálvan og lyklarnar. Síðani koyrdi hann súkkluna í viðførisrúmið og setti seg inn í bilin. Tá ið hann var komin í bilin, hugdi hann í brævbjálvan og vitaði, um allir pengarnir vóru í. Har var alt í, sum avtalað. So var klárt at koyra út á landsvegin. Bilurin streyk avstað. Tað var ein rúgva bilum, men longur burtur hann kom frá miðbýnum, minkaði ferðslan, og tá ið hann næstan var komin til havnarlagið, sá hann bert í reyvina á einum bili. Tíbetur snaraði bilurin til vinstru. So hann koyrdi oman á havnarlagið. So stillaði hann bilin í frígear, koyrdi hondbremsuna niður, fór úr bilinum, og tók súkkluna úr viðførsrúminum. Hann hugdi rundan um seg,  har vóru bara tveir ravnar, sum vóru ónýtilig vitni. So skumpaði hann bilin út á sjógv og stóð og bíðaði, til bilurin var horvin í tann svarta kalda sjógvin.

Hann setti seg á súkkluna, tí hann hevði ein langan túr heim aftur.

Tryggingarsvikið var gevandi, hann hevði fingið nógv viðskiftafólk, síðani hann byrjaði fyri umleið seks árum síðani. Fólk komu gleðiliga við pengum, fyri síðani sjálvi at fáa meira pengar frá tryggingini. Nú hevði hann endiliga fingið so nógvar pengar, at hann kundi liva í “LUKSUS.”

Ein tíma seinni var hann aftur við hús.

Er tað tú Jan? Hoyrdi hann eina keðiliga vælkenda rødd spyrja.

Hvør annar skuldi tað verið? Tú kemur so seint. Hvar hevur tú verið?

Hansa, kona hansara, kom við fullari ferð, tá ið hann ikki svaraði. Hann skundaði sær at koyra brævbjálvan í skrínið, sum hann goymdi allar pengarnar í. So eingin skuldi finna teir. “Hví svarar tú ikki?”

“Eg havi bara verið ein súkklutúr,” fýsti hann og fór framvið henni og so í song.

Morgunin eftir var hann glaður, at hann ikki var vaknaður, tá konan fór til arbeiðis.

Hann fór upp, fekk sær morgunmat. Gjørdi seg kláran til avtaluna við Mai-Britt. Beint áðrenn hann skuldi út, bankaði upp á dyrnar.

Hann tók í handtakið og læt hurðina upp. Har stóðu tveir menn í uniformi. Tann eini spurdi, “ert tú Jan Petersen?”

Jan nikkaði og fekk ilt í búkin. Í somu løtu var honum greitt, at hann ikki fór at síggja Mai-Britt í dag.

2

“Vit mugu tíverri biðja tygum koma við okkum, tí tú ert undir illgruna fyri tryggingarsvik. Klokkan er 09.15, og tygum eru handtikin”

Hann visti, at tað einki hjálpti at mótmæla, tá ið ein verður handtikin av løgregluni.

Teir filmarnir, sum politiið hevði víst honum, vóru myrkir og kornutir, tí teir vóru upptiknir við sera vánaligum ljósumstøðum, men tað var einki at ivast í, hvør høvuspersónurin var. Tað var eingin uttan hann sjálvur, tá ið hann tók ímóti brævbjálvum og lyklum, og til seinast skumpaði bilin útav kaikantinum, so hann var noyddur at játta.

Hann roknaði við at fáa ein linari dóm, tí hann hevði játtað seg sekan. Haraftrat væntaði hann at politiið ikki fór at rannsaka íbúðina. Teir kundu ikki vita, at tað meginparturin av pengunum vóru goymdir í kjallaranum. Hann hevði sagt teimum, at hann hevði brúkt hvørt einasta oyra. Tað virkaði sum um teir trúðu honum.

Hann tók postkortið fram aftur. Hann hevði hugsað um, hvør hevði givið honum tað. Og hvør hevði filmað hann. Hann hevði illgruna um, at tað var hansara kappingarneyti. Men hann var ikki vísur, onkuntið hevði hann illgruna til Mai-Britt. Hon hevði ikki viljað havt nakað við hann at gjørt, síðan hann var handtikin.

Hann las kortið einaferð afturat. Nú ivaðist hann ikki í, hvør tað var. Tað var jú handskriftin hjá Hansu. Einki at ivast í.

Hann varð ikki kløkkur, tá ið hon vildi skiljast, og so slettis ikki aftaná dómin. Tað vóru fleiri ár síðan, tey vóru hildin uppat at elska hvønn annan. Húsið stóð í hansara navni, so hon var noydd at flyta út, út úr húsinum. Tað var gott, tí honum dámdi ikki tankan, at hon og pengarnir skuldu vera undir sama taki. Men hon var ikki bara flutt úr húsunum, hon var farin heilt til “BRAZILIA!” so hann var tikin við nøsini.

Hann sakk niður í smølu songina við kortinum í hondini. Tað var Hansa, sum hevði filmað seg. Hann átti eitt filmstól, men Hansa hevði ikki víst nakran áhuga fyri tí. Hon má hava vant í loyndum. Hann var ongantíð heima. So hon hevði haft nokk av tíð til tað. Hon hevði ivaleyst njósnast eftir honum, tí hon hevði fingið illgruna um, at hann hevði eina frillu.

Sum síðuvinning, hevði hon varnast hansara skitna arbeiði. Tey reyðu bakljósini, sum hann hevði sæð, tá ið hann koyrdi oman á havnarlagið, vóru heilt víst frá hennara lítla bili.

3

Nú hevði hon eisini funnið pengarnar. Pengarnar, sum hann skuldi hugna sær við, í sínum luksus lívi var alt til einkis gjørt.
Hann skræddi kortið í smá pettir, og hugsaði um tað speiska orðið “BRAZIL”, og tað smiley’ið við tí stóra smílinum, sum datt spottandi niður fyri føtur hansara.
Eg aftanfyri rimar, HANSA í BRAZIL!!!.

*Óli Hansen 448913/448710*
*Helgi Lamhauge 449766*
*Skúli: Glyvra skúli*

*Flokkur: 7.A.*